# Sløkkileiðarastarvið verður fulla tíð

**Tvær ferðir hevur Klaksvíkar kommuna lýst deiltíðarstarvið sum sløkkiliðsleiðari leyst at vera. Hetta kemur av, at eftir fyrri lýsingina, gjørdi kommunan av, at starvið skal setast fulla tíð, og so mátti lýsast av nýggjum. Fyrsta dagin verður somuleiðis ein mentunarleiðari settur í kommununi**

STARVSETAN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Nýggjur sløkkiliðsleiðari verður helst settur eftir summarfrítíðina í Klaksvíkar kommunu. Starvið verður tá fulla tíð*

*Savnsmynd*

**Klaksvík:**
Starvið sum sløkkiliðsleiðari í Klaksvík hevur verið deiltíðarstarv. Men nú hevur kommunan gjørt av, at starvið framyvir verður fulla tíð.

Hetta hevur gjørt, at starvsetanin av nýggja sløkkiliðsleiðaranum hevur drigið út.

– Vit kunngjørdu ikki í fyrru lýsingini, at starvið var fulla tíð, og tískil mátti lýsast av nýggjum, greiðir Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, frá.

Allir umsøkjararnir fyrru ferð hava fingið boð um, at starvið verður fulltíðarstarv, og verða teirra umsóknir tiknar við aðru ferð, um tað er teirra ynski. Ella kunnu tey søkja av nýggjum. Tað er upp til tey sjálvi.

Borgarstjórin væntar, at starvið verður sett eftir summarfrítíðina í ár. Men neyvan byrjar nýggi sløkkiliðsleiðarin í starvinum fyrr enn 1. januar 2005. Hetta kemur av, at ongin játtan er á fíggjarætlanini fyri 2004 til ein sløkkiliðsleiðara í fulltíðarstarvi.

Inntil nýggi sløkkiliðsleiðarin tekur við starvinum, heldur undanfarni fram.

### Mentunarleiðari

Síðani kreppuna í nítiárunum hevur Klaksvíkar kommuna onga mentunardeild ella leiðara havt. Hesi vórðu spard burtur tá. Og býráðsskrivarin og borgarstjórin hava so røkt tær uppgávurnar síðani.

Men nú hevur kommunan søkt eftir mentunardeildarleiðara, og verður hann settur á fundi í nærmastu framtíð.

Steinbjørn veit ikki við vissu, nær fundurin verður, men tað kann verða í hesu vikuni.

Borgarstjórin sigur, at nógv hevur ligið á láni á mentunarøkinum øll hesi árini, ongin leiðari hevur verið.

– Nógv er, sum hendir og ikki hendir. Harumframt eiga mentunartiltøkini at verða betur skipað, og tað meta vit ein mentunarleiðari fer at verða við til at bøta um, sigur Steinbjørn.

Mentunarleiðarin kemur somuleiðis at virka sum skrivari í mentunarnevndini, sum hann fer at arbeiða beinleiðis undir.

# Barnaróðurin er framtíðin

**Í fjør byrjaði Róðrarsamband Føroya at skipa fyri barnaróðri á FM stevnunum. Hetta varð gjørt við tí fyri eyga at venja tey ungu við at sita í báti, áðrenn tey hava aldur til at luttaka í sjálvum FM róðrunum**

KAPPRÓÐUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*– Tíð skal setast av til barnaróðurin, sigur formaðurin RSF, Hannis Joensen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Eins og á hinum FM stevnunum varð eisini skipað fyri barnaróðri á fjarðastevnu í Vestmanna. Børnini ganga høgt upp í venjingarnar, og tað sást eisini aftur hjá fleiri manningum, sum mugu sigast at vera væl fyri.

Hannis Joensen, formaður í RSF, sigur, at barnaróðurin er komin fyri at verða.

Hann heldur so avgjørt, at tað er gott fyri kappróðurin, tí kappingin um tey ungu er hørð í teimum mongu ítróttargreinunum her á landi.

– Tíðirnar eru nógv broyttar, og ung um 17 ára aldur hava mangan ongantíð sitið í báti, tá tey fyri fyrstu ferð luttaka í FM róðri. Tí halda vit, at hetta kann vera ein góður møguleiki at venja seg við at sita í báti og at læra at rógva á ungum árum, sigur Hannis.

### Dregur ikki út

Mong eru tey, sum halda, at barnaróðurin dregur FM róðrarnar út. Á heimasíðuni hjá Klaksvíkar róðrarfelag sæst á kjakinum, at ymsar meiningar eru um, hvørs tað er rætt at hava barnaróðrarnar mitt í FM róðrinum.

Formaðurin í RSF sigur seg ikki skilja, at tað verður skyldað upp á barnaróðurin fyri at draga tíðina út.

– Eg haldi ikki, at hatta er heilt rætt, sigur hann. Hann greiðir víðari frá, at í fjør varð sjálvur høvuðsdómarin nýttur til at starta børnini eisini, og tað var ikki so skilagott.

– Í ár hava vit so ístaðin heitt á feløgini sjálvi um at útvega ein startdómara til børnini, og tað gongur nógv betur, heldur Hannis fyri.

Hann leggur dent á, at tað neyvan er barnaróðurin, sum ger, at klokkan kann líða væl móti seks ella sjey á kvøldi, áðrenn kappróðurin er liðugur.

Samstundis viðgongur hann tó, at tað koma misskiljingar fyri, sum tó gera, at bíðað verður eftir barnaróðrunum.

– Á fjarðastevnuni vóru onkrar misskiljingar, sum komu av, at dómararnir ivaðust í, um teir skulu útseta barnaróðrarnar til aftan á tíggjumannaførini. Hetta komst av streymviðurskiftunum, og tað kann man bara skilja væl. Tí hóast alt mugu FM róðrarnir raðfestast hægri, tá slík viðurskifti gera seg galdandi, sigur formaðurin í RSF.

### Seta tíð av

Hannis Joensen sigur, at nú barnaróðrarnir eru komnir, so eigur tíð eisini at verða sett av til teir.

– Sjálvandi taka teir róðrarnir eisini sína tíð, men eg haldi so avgjørt, at tað er rætt at seta tíð av til tað. Og at tað er skeivt at siga, at barnaróðurin ger ónáðir. Hetta er jú framtíðin hjá ítróttini, sum vit tosa um, vísir hann á.

Sambært Hannisi, so hava summi fílst á, at teir startdómararnir, sum feløgini útvega, ikki eru nóg professionellir, men hesum tekur Hannis sær als ikki av.

– Her er talan um fólk, sum hava róð í mong ár, sum feløgini útvega, og eg havi fult álit á, at persónarnir, sum feløgini finna, vita, hvat tey skulu gera, tá bátarnir verða lagdir, sigur Hannis Joensen, formaður í RSF.

Úrslitini frá barnaróðrinum á fjarðastevnu í Vestmanna leygardagin:

**Barnaróður, gentur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Blikur | 02.42.22 |
| 2 | Ørnin | 02.47.23 |
| 3 | Havfrúgvin | 02.48.04 |
| 4 | Sílið | 02.49.12 |
| 5 | Royndin Fríða | 02.51.09 |
| 6 | Tekla | 02.53.04 |
| 7 | Firvaldur | 02.54.01 |
| 8 | Fípan Fagra | 02.54.15 |
| 9 | Dúgvan | 03.05.01 |

**Barnaróður, dreingir**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sílið | 02.21.05 |
| 2 | Blikur | 02.24.00 |
| 3 | Fípan Fagra | 02.26.20 |
| 4 | Junkarin | 02.32.10 |
| 5 | Royndin Fríða | 02.32.23 |
| 6 | Hulda | 02.37.17 |



# Anastasis í Føroyum



*Manningin á Anastasis telir fleiri enn 300 fólk úr 30 ymsum londum*

Sjúkrahússkipið Anastasis kom í gjár til Føroya. Marie Keevern er sjúkrasystur umborð á Anastasis.

– Vit eru her í Føroyum fyri at opna okkara skip og lata fólk vita um tørvin í Afrika. Vit fara at kunna um, hvat Mercy Ships ger fyri at ganga tí tørvinum á møti. Vit bjóða fólki umborð fyri at síggja, hvat vit gera. Tey kunnu melda seg til sum manning á skipinum, um tey vilja við okkum til Afrika. Vit taka eisini ímóti gávum av ymsum slagi fyri at stuðla afrikanum, sigur Marie Keevern, sjúkrasystur.

Manningin á Anastasis telir fleiri enn 300 fólk úr 30 ymsum londum. Anastasis hevur júst verið á eini sjey mánaðar langari ferð til Sierra Leone í Vestur Afrika, har tey hava gjørt ymiskt hjálpararbeiði.

Næsta uppgávan verður í lýðveldinum Benin frá november 2004 og sjey mánaðir fram. Men fyrst er talan um fyrireikingar í Føroyum. Tann 15. juli fer Anastasis avstað aftur.

**-hkm**

# Øll fara upp

Nú eru sáttmálasamráðingarnar millum Almanna- og heilsurøktarafelagið og Fíggjarmálaráðið endaðar við semju. Partarnir settu sína undirskrift á nýggja sáttmálan mánadagin tann 5. juli.

Frá Almanna- og heilsurøktarafelagnum verður sagt, at úrslitið er í tráð við ætlanirnar hjá felagnum um at menna førleikan hjá limunum.

Tann endunýggjaði sáttmálin stendur við til tann 1. oktober 2005. Semjan er grundað á ein karm, sum er umleið 9 %. Tann 1. oktober 2003 hækkar grundlønin 4 %, og tann 1. oktober 2004 hækkar grundlønin 1,67 %. Tann 1. oktober 2004 hendir eisini tað, at lønin hjá øllum starvsfólkum, sum sáttmálin fevnir um, hækkar eitt stig á lønarstiganum.

**-hkm**

# Nýtt andaligt




*Nýggja fløgan eitur »So gott at vita«*

Nýggj fløga er júst útkomin á føroyska marknaðin. Talan er um andaliga fløgu, sum kom út tann 1. juli. Plátan kallast »So gott at vita.« Tað eru føroyskir ungdómar, sum hava sungið og spælt inn á fløguna. Linda Holmberg Andreassen og Michael Andreassen hava lagt fløguna til rættis. Á fløguni eru andaligir sangir við løttum og vælskiljandi teksti, verður sagt í tíðindaskrivi. Meginboðskapurin á fløguni er gleðiboðskapurin um Jesus.

Tað er 3'arin í SMS, sum umboðar søluna av fløguni »So gott at vita,« sum er at fáa kring landið júst nú.

**-hkm**

# Harmonikur í Føroyum

**Tíðindaskriv**
*Harmonikufelag Føroya*

Fríggjadagin 9. juli kemur Harmonikufélag Eyjafjarðar til Føroya. Longu fríggjakvøldið verður almennur dansur í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, har íslendingarnir og limir í Harmonikufelag Føroya skiftast um at spæla og helst eisini spæla saman.

Íslendingarnir búgva á Hotel Føroyum og ætla at nýta hesar dagarnar til útferðir. Kirkjubøur, Váganar og flestu bygdirnar í Eysturoynni eru á skránni.

Bólkurin vitjar í útvarpinum í samband við »Góðan morgun, Føroyar«-sendingina fríggjamorgunin 9. juli. Sama dag klokkan 16:00 verður spælt á torginum í SMS.

Ferðaleiðarar hjá harmonikubólkinum eru Føroya-vinirnir Lauga og Egill av Norðfirði. Egill er tónleikalærari og spælir sjálvur fleiri ljóðføri m.a. harmoniku. Hann var við á árliga harmonikutúrinum hjá Norrönu í fjør saman við Kallum við manning úr Leirvík og Fuglafirði.

# Science-fiction í Mentamálaráðnum

**Tíðindaskriv**
*Mentamálaráðið*

Brandur Patursson letur upp listaframsýning í Mentamálaráðnum í dag klokkan 15 og fram til 17. Framsýningin er opin mánadag til hósdag frá klokkan 8 til klokkan 16. Fríggjadag er opið frá klokkan 8 til 15.

Brandur Patursson arbeiðir við ymiskum tilfari í listaarbeiði sínum. Sumt er í tvívídd og sumt í trívídd. Tað tvívídda er oftast smáir figurar, sum siga frá søgum, ið líkjast søgum úr teknirøðum.

Íblásturin til søgurnar og útsjóndina á figurunum kemur helst frá kampkynstrinum eitt nú Kung-fu og Ninja, sum Brandur íðkar nógv. Í kampkynstrinum verður nógv arbeitt við rørslum djóranna, og hesin rørslutátturin og hugsjónin í kampkynstrinum er keldan til fleiri av figuratiónunum. Eisini science-fiction heimurin úr filmum og teknirøðum hava árin.

Í tvívídda forminum arbeiðir Bárður meira abstrakt-ekspressivt í mun til tað tvívídda. Har arbeiðir hann traditionelt við kompositión og litum, men nýtir kroppin og hárið at mála við ístaðin fyri vanligu penslarnar. Her kemur leikurin og frásagnin aftur inn í tvívídda formin, sum ræður í tvívídda forminum.

Hvussu hesir ymsu formar bindast saman sæst best, tá framsýningin er sett upp. Í arbeiðstilgongdini er rúmið, sum framsýnast skal í, altíð í huga. Figurar og myndir laga seg eftir rúminum og verða sett upp soleiðis, at alt tilsamans myndar eina hugveking.

Framsýningin í Mentamálaráðnum er opin fram til 1. oktober 2004.